# Hugsið um umhvørvið, tá ið tit taka nátar



Nú nátatíðin er fyri framman, vilja vit minna tykkum á serstøku leiðbeiningarnar viðv. burturbeiningini av leivdunum.

Hugsið um umhvørvið og havið hesar leiðbeiningar í huga:

- Burturkastið skal vera so væl avvatnað sum gjørligt fyri at minka um útlátið úr roykinum á brennistøðini, sum kann dálka umhvørvið.
- Fjaðrar skulu vera í posum, sum ikki eru heilt lufttættir, so posarnir ikki bresta, tá ið burturkastið verður handfarið víðari.
- Leivdirnar kunnu latast inn á kommunala endurvinningarplássið. Yvirlit yvir plássini og upplatingartíðirnar síggjast her.

Fyribyrging av nátasjúku:

Heilsufrøðiliga starvsstovan mælir til at taka hesi atlit fyri at fyribyrgja nátasjúku.